# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK



*Bertie Ahern á veljaraferð í býnum Athlone í gjár*

# Búskapurin kann bjarga Bertie

**Írland hevur havt stóra búskaparliga framgongd tey seinnu árini, og tað kann tryggja stjórnini hjá Bertie Ahern afturval í dag. Hví koyra eitt sera vælvirkandi lið til hús?**

Tað er ein av spurningunum, sum írski forsætisráðharrin, Bertie Ahern, hevur sett veljarunum upp undir tjóðartingsvalið í dag. Hann kann vísa á, at síðani sitandi stjórnin kom til valdið, hevur Írland havt eina so stóra búskaparframgongd sum ongantíð fyrr. Ja, í altjóða fíggjarheiminum verður Írland ofta umrøtt sum "tann keltiski tikarin". Tey seinastu árini hevur vøksturin ikki verið so stórur, men Bertie Ahern kann vísa á, at viðurskiftini hava verið støðug.

Andstøðan roynir í sínum lagi at vísa á, at stjórnin hevur brotið síni lyfti á fleiri týðandi økjum innan búskapin og heilsuverkið, og so heldur andstøðan, at tíggju ár við sama stýri er nóg mikið.

### Javnt

Meiningakanningar upp undir valið í dag hava víst, at tað verður rættiliga javnt ímillum stjórnarsamgonguna og andstøðuna. Tann stóri stjórnarflokkurin, Fianna Fail, fær sambært kanningunum umleið 41 prosent av atkvøðunum, og tann størsti andstøðuflokkurin, Fina Gael, fær væntandi umleið 27 prosent. Báðir flokkar skulu sostatt hava stuðul frá øðrum flokkum fyri at skipa stjórn. Í løtuni fær stjórin hjá Bertie Ahern stuðul frá tí lítla Demokratiska flokkinum, meðan Arbeiðaraflokkurin hevur lovað at styðja Fina Gael.

# Kinesarar stúra fyri vatnflóð

**Umstøðurnar líkjast teimum, sum í 1998 kravdu 3.000 mannalív, siga kinesiskir serfrøðingar**

Kinesisku myndugleikarnir ávara nú tey, sum búgva fram við teirri stóru Yangtze-ánni. Áin, sum hevur sínar keldur í fjøllunum í Tibet, er vaksin í seinastuni, tí kavin í teimum tibetansku fjøllunum bráðnar skjótari enn vanligt. Tað gjørdi hann eisini í 1998, og tað elvdi til eina oyðandi vatnflóð, sum kostaði umleið 3.000 kinesarum lívið.



*Nógvir býir eru fram við Yangtze-ánni*

– Tær veðurfrøðiligu umstøðurnar í Yangtze-dalinum líkjast teimum í 1998, sigur Cai Qihua við blaðið China Daily. Hann er varastjóri á einum stovni, sum hevur eftirlit við, hvussu nógv vatn er í Yangtze.

Sambært China Daily hevur veturin verið óvanliga lýggjur í Kina og í Tibet, og kinesiskir veðurfrøðingar halda, at tað hevur samband við veðurfyribrigdið El Nino, sum hitar sjógvin í einum parti av Kyrrahavinum. Fyrr hava kinesisku veðurfrøðingarnir sagt, at tann óvanliga lýggi veturin er ein avleiðing av tí vaks-0andi hitanum á Jørðini og stendst av dálking.

## STUTT SAGT

### Eiga at fara til hús

Tveir triðingar av týska fólkinum halda, at Týskland eigur at taka sínar hermenn úr Afghanistan. Tað vísir ein meiningakanning, sum bleiv gjørd, eftir at tríggir týskir hermenn doyðu í einari bumbuspreinging í Afghanistan seinasta vikuskiftið. Týskland hevur 3.000 friðarvarðveitandi hermenn í tí ófriðarliga landinum, og higartil eru 21 týskir hermenn falnir har. Eftir hart trýst frá NATO er Týskland nú gingið við til at senda kanningarflogfør til syðra part av Afghanistan, har tað hevur verið serliga ófriðarligt. Eitt nú hevur Kanada sínar hermenn har suðuri í Afghanistan, og higartil hevur landið mist 54 hermenn har.

### Trælahald

Løgreglan í New York hevur ákært eitt múgvandi par í býnum fyri eitt so sjáldsamt lógarbrot sum trælahald. Løgreglan sigur, at hjúnini, sum eru 35 og 51 ára gomul, hava havt tvær indonesiskar kvinnur sum trælir heima í marglætishúsunum á Long Island í New York. Hjúnini arbeiða við at selja luktilsi. Tey hava verksmiðjur í Singapore og í Bahrain og stýra einum heimsumfatandi søluneti úr húsunum á Long Island. Umframt ákæruna um trælahald eru tey eisini ákærd fyri at hava hýst ólógligum innflytarum.

### Ikki Turkaland

Nývaldi franski forsetin, Nicolas Sarkozy, hevur ongantíð dult fyri, at hann er ímóti, at Turkaland sleppur upp í ES, og ta áskoðanina hevur hann enn. Eftir ein fund í gjár við formannin í ES-nevndini, Jose Manuel Barroso, segði Sarkozy, at Turkaland hevur einki at gera í ES. Hann vildi ikki siga, hvørja støðu Frakland hevur til samráðingarnar um turkiskan limaskap, sum byrjaðu fyri tveimum árum síðani.